## Kanska 800 deyð í Kina

Teir kinesisku myndugleikarnir halda uppá, at ófriðurin í landslutinum Xinjiang teir seinastu dagarnar hevur kravt 156 mannalív, men talsmaðurin hjá uiguriska minnilutanum sigur, at tað talið er alt ov lítið. Asgar Can sigur við fronsku tíðindastovuna AFP, at frá summum keldum hevur hann fingið at vita, at 600 eru deyð, og at onnur siga talið vera um 800. Tí heldur talsmaðurin, at tað rætta talið man vera einastaðni ímillum 600 og 800. Ófriðurin í Xinjiang hevur fingið nógva umrøðu kring heimin, og fleiri lond hava funnist at framferðini hjá teirri kinesisku løgregluni, sum verður løgd undir at vera alt ov harðrend.



## Bumba drap skúlabørn

Minst 12 skúlabørn í Afghanistan doyðu, tá ein sjálvmorðsbumbumaður sprongdi eina bumbu uttan fyri skúla teirra í morgun. Myndugleikarnir siga, at bumbumaðurin sat í einum bili uttan fyri skúlan, og at hann sprongdi bumbuna, júst sum nakrir løgreglumenn komu framvið. Tí er ógreitt, um bumban var ætlað skúlanum ella løgregluni ella kanska báðum, skrivar Reuters. Forsetaval verður í Afghanistan tann 20. august, og NATO hevur fyrr ávarað um, at Taliban fer at herða sítt virksemið upp undir valið fyri at órógva tað. Enn hevur eingin átikið sær ábyrgdina av bumbuálopinum í morgun.

# Ullabann ein vanlukka

**- Útflutningsbannið fyri ull kemur ógvuliga illa við hjá Sirri, og fer hetta bannið at standa við komandi ár eisini, verður tað ein vanlukka fyri føroyska ullaframleiðslu, sigur Árni Brattaberg, stjóri í ullafyritøkuni Sirri**

ULLABANN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Handilin Sirri á Áarvegnum verður hart raktur, verður ikki ein loysn funnin á útflutningsbanninum av ull*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú er tíðin, at menn ganga fjøllini í royting. Trúðliga hevur ullafyritøkan Sirri seinastu tíggju árini verið hentur avtakari av ull, og teir hava tikið móti størri og størri nøgd ár undan ári.

- Í fjør tóku vit móti 31,5 tonsum av ull, og nøgdin hevði helst komið upp á 35 tons í ár, men við tí útflutningsbanni, sum er komið, sær illa út fyri nakrari móttøku í ár, sigur Árni Brattaberg, stjóri í Sirri.

Nýggja ásetingin sigur, at fyri at ull skal kunna flytast av landinum, skal hvør seyður sær kannast av einum djóralækna undan klippingini, men ikki nóg mikið við tí. Ullin skal eisini kunna sporast aftur til seyðin skuldi tað víst seg, at seyðurin hevur einahvørja sjúku, sum rættvísger útflutningsbann.

Alternativið er, at ullin verður vaskað í Føroyum, men tað er nakað, sum als ikki loysir seg.

- Hetta loysir seg ikki í Noregi, so tað sigur seg sjálvt, at tað loysir seg enn minni hjá okkum við teimum smáu nøgdum, talan er um, sigur Árni Brattaberg.

Sirri hevur verið í sambandi við landsdjóralæknan, men har er eingin loysn komin á málið, og tá vit spurdu í vinnumálaráðnum var málið so nýtt á teirra borði, at tað ikki er viðgjørt enn.

Hartil kemur so eisini, at feriutíð er, og bæði Birna Mørkøre, landsdjóralækni, og Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri, eru í summarfrí.

### Drepur vinnuna

Tað er ein nýggj áseting frá 2009 um heilsuásetingar av úrdrátti úr djórum, sum forðar fyri, at ullin kann flytast av landinum. Hetta er ein áseting í sambandi við ES-regulgerð, sum eisini er sett í gildi fyri Føroyar.

Tað er eingin yvirskipað heilsutrygdarskipan fyri seyð, og nú hevur ullaframleiðslan rent seg í sama trupulleika, sum seyðaskinn hava liðið undir í nøkur ár.

- Vit hava í løtuni onga skipan, sum skrásetir heilsustøðuna hjá seyðinum, og tað- tykir mær eitt sindur leyst, hvar ábyrgdin skal plaserast, sigur Árni Brattaberg.

Hann heldur, at tað finnast tvær loysnir á málinum.

- Annað er, at øll ullin lýkur krøvini fyri útflutningi, og tað vil siga e vaskað, áðrenn hon fer av landinum. Men júst hetta varð slept fyri nøkrum árum síðani, tí tað stutt sagt ikki loysti seg at vaska ullina í Føroyum, sigur Árni Brattaberg.

- Ullin verður ikki longur viðgjørd í Føroyum, heldur ikki spunnin. Einki virksemi sum so er longur í Vági, øll framleiðsla er flutt til Litava, sigur Árni Brattaberg.

- So fyri at fáa ullina av landinum mugu íløgur gerast í vasking, og eingin veit, hvat heilsumyndugleikarnir fara at krevja í so fall, so tað kann skjótt loypa upp í milliónа íløgu. Og tað drepur vinnuna, sigur Árni Brattaberg.

### Loysn má fáast

Hin møguleikin er, at heilsuskipanin onkusvegna fæst at virka í Føroyum, so ullin aftur kann flytast av landinum.

- Vit hava upparbeitt okkum neyðuga skotbráið, so vit hava ull niðurfyri og klára okkum tí í ár. Men er eingin loysn funnin á trupulleikanum til komandi ár, endar vinnan í einari katastrofu, sigur Árni Brattaberg.

Hann kennur tó, at vinnumálaráðharrin, Jóhan Dahl, er sinnaður at finna eina loysn á málinum, men mitt í feriutíðini og við roytingini skjótt farnari aftur um bak, sær ikki so ljóst út fyri árið í ár.

Men eitt er, at innsavnanin av ull verður slept eitt ár. Eitt annað er, hvar hendan ullin so endar. Og heldur ikki har eru so nógvir møguleikar, tí endar hon ikki við at sløðast í haganum, endar hon á brennistøðunum. Og tað er bæði synd og skomm.

Fyribils sær hetta tó at gerast úrslitið í ár. Hvat so hendir komandi ár, má so bara tíðin vísa.

Tað bar ikki til at fáa eina viðmerking frá landsdjóralæknanum.

## Notat vedr mulighed for eksport af ubehandlet uld fra Færøerne til EU

**Dato: 16.06.2009**

På given foranledning er gældende betingelser og muligheder for eksport af uld fra Færøerne til EU undersøgt.

**Rammer**

Første januar 2009 trådte Kunngerð nr. 99 frá 20.november 2006 um heilsuásetingar fyri hjáframleiðslu úr djórum, sum ikki er ætlað til matna, sum broytt við kunngerð nr. 85 frá 3. oktober 2008 í kraft.

Hermed implementeres Biproduktforordningen, Rådets Forordning nr. 1774/2002 af 3. oktober 2002.

Forordningen deler animalske biprodukter op i tre risikogrupper. Ubehandlet uld hører under kategori-3 biprodukter (low-risk) under forudsætning af at ulden stammer fra dyr, der ikke udviste kliniske tegn på nogen sygdom (se Artikel 6, pkt. 1 k) og Bilag VIII, Kapitel VIII, A pkt. 1.)

**Betingelser**

Forudsat at den ubehandlede uld opfylder betingelserne om at stamme fra dyr, der ikke udviste kliniske tegn på nogen sygdom, at den er tør og pakket i lukket emballage, kan den indføres direkte til EU til det tekniske anlæg, der skal forarbejde ulden eller til et anlæg for mellemprodukter (se Bilag VIII, Kapitel VIII, B pkt. 4 a) og b))

Den lukkede emballage skal mærkes, og ulden skal ledsages af et handelsdokument (se Artikel 7 og Bilag II, Kapitel III).

**Begrænsninger**

Da der pt ikke gennemføres nogen form for sundhedsovervågning eller rutinemæssig registrering af sundhedsstatus af får på Færøerne, lever ulden ikke op til kravet i forordningen og kan dermed ikke umiddelbart indføres i EU.

**Muligheder**

En løsning kan være at lade en praktiserende dyrlæge inspicere fårene inden klipning og dokumentere sundhedsstatus under betingelser om sporbarhed. En anden mulighed er at bearbejde ulden på en sådan måde, at den ikke længere betegnes som ubehandlet og dermed ikke længere omfattes af forordningen.

**Susanne Kabell, Dyrlæge, phd**